gult18 cyan18 magenta18 svart18



# Tvey silvurmerki í svimjing



Blandaða stafettin á 50 metrum vann silvur mánadagin

**Vónirnar vóru um gull, men Føroyar máttu taka til takkar við tveimum silvurmerkjum á fyrsta svimjidegnum**

SVIMJING
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Hóast talan ikki gjørdist um tey heiðursmerki, sum føroyingar høvdu vónir um, tá hol varð sett á svimjikappingina, so helt landsliðsvenjarin, Petur Heðin á Fløttu, kortini, at svimjararnir høvdu svomið upp til sítt besta.

### Svumu væl

Hetta gjørdist tó akkurát ikki nóg mikið, tá talt varð saman. Í 4X50 metra blandaðari svimjing var føroysku liðið ein triðings sekund frá gullinum, og í 100 metra bringu var Ásbjørn Hansen 18 hundraðpartar av einum sekundi frá sama heiðursmerki.

- Sjálvandi høvdu vit sett nøsina upp eftir tveimum gullmerkjum, men okkara tíðir vóru bara ikki nóg góðar, segði Petur Heðin av Fløttu.

- Eg kann tó ikki seta ein fingur á avrikini hjá svimjarunum, tí hesir svumu allir upp til sítt besta. Í liðkappingini eri eg nøgdur um avrikið hjá øllum á liðnum, og Ásbjørn setti persónligt met í 100 metra svimjingini um morgunin, og hóast hann var eitt lítið sindur seinni um kvøldið, so hevði hann kortini ikki vunnið gull við tíðini, sum hann svam um morgunin.

- Tað vísir seg bara, at hini londini hava ment seg sera nógv, og vit kunnu so bara staðfesta, at vit ikki hava ment okkum samsvarandi, segði Petur Heðin, tá vit prátaðu við hann mánakvøldið.

Vónirnar um gull eru tó á ongan hátt gloymdar, og spennandi verður at síggja, um fyrsta gullmerkið á leikunum fer at koma týsdagin, tá føroysk luttøka verður í seks av teimum tíggju kappingunum, sum eru á skránni.



Eisini Ásbjørn Hansen svam seg til silvermerki. Í innleiðandi bólkunum setti hann eisini persónligt met, og var hann beint undir hesum í finaluni

# Kvinnurnar bumbaðu aftur

**Ynos Mon fekk at kalla somu viðferð frá fótbóltskvinnunum mánadagin, sum vertirnir høvdu fingið sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Líkt er til, at fólk veruliga hava fingið eyguni upp fyri, at føroysku fótbóltskvinnurnar í øllum førum eru nakrar klassar oman fyri tað, sum tey vanliga hava sæð her á leiðini.

Heilt fitt av fólki - og sjálvandi nógvir føroyingar – høvdu leita sær til eystursíðuna á Man, har kvinnurnar spældu dyst mánadagin.

### Tol gav úrslit

Mótstøðuliðið hesa ferð var Ynos Mon, og í mun til dystin móti Man, so møttu føroysku kvinnurnar hesa ferð einum liði, sum legði alstóran dent á verjupartin, so málini ikki skuldu gerast ov nógv.

Tá føroyska spælið samstundis ikki gekk heilt nøktandi í fyrra hálvleiki, eydnaðist væl hjá Ynos Mon at halda fast, og talan gjørdist bert um hitt eina málið í fyrra hálvleiki.

Tað skeyt Helga Ellingsgaard, og tá hon stutt inn í seinna hálvleik hevði skotið tvey afturat, var leyst og liðugt hjá føroysku gentunum.

Fýra føroysk mál komu afturat, so tá samanum kom, var als eingin ivi um, hvat av liðunum var hitt betra.

Rannvá Andreasen, sum í fyrsta dystinum skeyt ikki færri enn fimm mál, fekk einki hesaferð, men hinvegin var hon við í so at siga øllum málunum, og fimm ferðirnar átti hon næst seinasta føroyska fótin á, áðrenn mál varð skotið.

Til meira dramatiska partin av dystinum hoyrdi, at Maria Vang í fyrra hálvleiki noyddist av vøllinum, eftir at hon í hornasparksstøðu rendi saman við verjuspælara. Úrslitið var ein skeina oman fyri eyga, men vónandi fer hetta ikki at forða sterka verjuspælaranum í at taka lut í hálvfinaluni, sum verður spæld hósdagin.

### Áland í finaluni

Vinna føroysku kvinnurnar hálvfinaluna, tykist sannlíkt, at tað verður Áland, sum bíðjar í finaludystinum.

Higartil hava tær av Álandi leikt tveir dystir, og úrslitið hevur í báðum førum verið stórsigrar. Móti Guernsey vunnu tær 9-1, meðan dysturin í gjár móti Isle of Wight endaði heili 13-0.

Líkt er soleiðis til, at talan verður um eina finalu millum Føroyar og Áland, og ivaleyst verður tá talan um ein sera spennandi dyst, soleiðis at føroysku kvinnurnar hóast alt fáa sterka mótstøðu á ferðini.



Maria Vang mátti av vøllinum í fyrra hálvleiki, tá hon fekk eina skeinu í pannuni eftir samanbrest í hornasparksstøðu

gult19 cyan19 magenta19 svart19



# Gomlu kenningarnir gingu aftur

**Í Hvalvík vunnu allar tær somu manningarnar, sum vunnu í fyrsta FM róðrinum á norðoyarstevnu**

KAPPRÓÐUR
*Jóanes Hansen*

Tað er synd at siga, at talan er um stórar útskiftingar, tá tað ræður um bátar, sum vinna í FM kappróðrunum.

Í Hvalvík gekk kappróðurin upp á stás, tá fyrsta skotið endiliga var latið av. Undarligt er tað, at tað skal ganga so illa at fáa fyrsta róðurin frá hondini til tíðina. Klokkan var næstan hálvgum fýra, áðrenn dreingirnir tóku fyrstu tøkini. Tað var spell, tí annars gekst sum eftir ánni. Kanska hevði tað verið eitt hugskot hjá sørvingum, at teir fóru at leggja dreingjabátarnar ein hálvan tíma, áðrenn tað tykist vera vanligt á stevnunum.

Havnarbáturin fer at vinna FM í Sørvági komandi leygardag. Tað fara kvinnurnar umborð á Páll Fanga og genturnar umborð á Fípuni Føgru eisini. Hesir manningarnar hava vunnið allar fýra kappingarnar, sum hava verið. Tær hava fult stigatal, og um bátarnir koma á mál, so skal vilja meiri enn illa til, um FM heitini ikki verða vunnin.

Tjaldrið við dreingjum og Nevið Reyða snávaðu í Fuglafirði, men tey vunnu aftur hesa ferð. Strálan við monnum setti enn eina ferð Sølmund og Riddaran upp á pláss. Tjaldrið, Strálan og Nevið Reyða liggja eisini sera væl fyri í FM kappingini.

Tað er møguleiki fyri, at allar kappingarnar verða avgjørdar undan ólavsøkuróðrinum. Um tað verður soleiðis, so verður komandi leygardagur størsti dagurin í kappróðrarsøguni í Klaksvík. Tað er ongantíð áður komið fyri, at tríggjar manningar í Klaksvík hava vunnið FM í einum ári.

At áhugin fyri kappróðri er sera stórur í Klaksvík sást leygarkvøldið. Tá Dúgvan kom á vánna klokkan knapt hálvgum níggju, var gylt av fólki og tók ímóti, og tað var rættuliga trongligt í neystinum, tá tey bjóðaðu drekkamunn. Leygardagin skipar róðrarfelagið í Klaksvík fyri útferð vestur í Vágar, og tað kann gerast ein minnilig ferð.

# Fípan heldur pláss



**Genturnar á Argjum tykjast vera tær einastu, sum kunnu vera orsøk til, at tær í Klaksvík ikki vinna allar róðrarnar**

KAPPRÓÐUR
*Jóanes Hansen*

**5–mannafør gentur:** Nýggja 5–mannafarið í Klaksvík við gentumanning hevur ongantíð roynt annað enn at vinna. Soleiðis sum tað hevur lagað seg í teimum fýra FM kappingunum, sum higartil hava verið í ár, so er eingin sum helst ivi um, at Fípan Fagra fer at vinna FM heitið.

Spurningurin er heldur, um tað fer at eydnast hjá teimum umborð á Fípuni at fara ósigraðar úr hesum kappingarárinum. Aftur í Hvalvík var munurin aftur til næstfremsta bátin ikki so ógvuliga stórur, men sigurin tóktist ongantíð at vera í vanda.

Fípan legði seg fremst í fyrstu tøkunum í startspurtinum. Blikur av Argjum royndi at fylgja við, og tær gjørdust tær drúgvastu í kappingini um næstfremsta plássið. Á málinum vóru tær bara ein stóran skut ella eina evarska lítla hálva bátslongd aftanfyri Fípuna Føgru, og spurningurin er, um Blikur fer at megna at gera nakað við Fípuna í Sørvági ella á ólavsøku.

Munurin aftur til nýggja Sílið á triðja plássinum var meiri enn ein bátslongd. Tjaldrið fylgdi væl við, meðan Ørnin á fimta plássinum var meiri enn tvær bátslongdir aftanfyri Tjaldrið.